**EIN SERA FLOTT**
Fender mandolin (óbrúkt) við Fishman M-100 Pickup til sølu fyri 7.000 kr. Videoband fylgir við.
*Tlf. 270427*

**ROLAND G-600 WORKSTATION**
1 1/2 ára gamal Roland G-600 synthezisari við ótal av fantastiskum ljóðum og arrangementum. Til sølu við pedal, 4 stk. rytmu/arrangement diskettum, einum Yamaha forsterkara og einum setti av Jamo hátalarum. Nýprísur 23.000 kr. til sølu fyri einans 14.500 kr.
*Tlf. 260590*

**EFTIRLÝSING**
Er tað nakar, ið hevur ein spolabandupptakara at selja mær, so ring vinarliga.
*Tlf. 218494*

**TIL SØLU**
Ein 10 GB mp3 spælari. Archos Jukebox Recorder 10Memory: 2MB Harddrive Capacity: 10GB (165H Music 128Kbps). Standard: MP3. Display: LCD. Size: 115 x 83 x 34mm. Accessories: Stereo Headphones / AC Adapter / Cable / Case. Interface: USB spælari til sølu fyri 2400 kr
*Tlf. 313471*

**V-AMP 2 BEHRINGER**
Manglar tær okkurt fikst til at venja við heima, so er V-AMP nakað fyri teg. Tilhoyr er taska, pedal og streymforsýning. (Pedalin hevur bert »up and down« functión). Alt er orginalt og er sum nýtt. Til sølu fyri einans 1.500,-
*Tlf. 522012*

**HÁTALARAR**
2 stk. Celestion 75W hátalarar til tann, sum antin vil skifta út ella byggja eitt kabinett sjálvur. Til sølu fyri einans 1.000,- fyri báðar.
*Tlf. 522012*

**KABINETT**
Marshall 4X12" 300W RMS Vinkul kabinett, Celestion hátalara, switch til mono og stereo við nýggjum hjólum. Til sølu fyri einans 3.000,-
*Tlf. 522012*

**MARSHALL FORST.**
til sølu 2 x 100 w. við chorus til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 268444*

**BIL-STEREO TIL SØLU**
Eitt Sony bilstereo v/ 2 hátalarum, 1 sub. og einum forsterkara til sølu fyri 3.500 kr.
*Tlf. 268444*

**MULTIEFFEKT TIL SØLU**
Ein boss gx-700 við 23 effektum rack-kassi fylgir við til sølu fyri 3000.
*Tlf. 268444*

**MULTIEFFEKT TIL SØLU**
Ein Boss ms-10 við 10 effektum til sølu fyri 2.000. Ymiskt tilhoyr fylgir við.
*Tlf. 268444*

**E-BOW TIL SØLU**
fyri 1.000 kr.
*Tlf. 268444*

**TRUMMUSETT TIL SØLU**
Peace trummusett - 5 trummur, hi-hat, 1 skál. Lítið brúkt , uml. 2 ára gamalt. Barnastødd. Kostnaður 3.500 kr.
*Tlf. 506121 / 314328*

## Út- & Sjónvarp

**SJÓNVARP TIL SØLU**
20" Funai sjónvarp sum nýtt, til sølu fyri 1.000,- kr.
*Tlf. 262271*

## Ymiskt

**BÍLIGAR FLOGFERÐIR TIL BARCELONA**
Ferð fyri tvey til Barcelona og aftur bíliga til sølu. Fráferð er 13. august og heimkoma 28. august.
*Tlf. 229565*
*ella 243348*

**TIL SØLU**
2 seymimaskinur, Philips sjónvarp, málningar. spísistovuborð v/ 4 stólum og bóndaborð við 6 stólum bíliga til sølu.
*Tlf. 442190*

**TIMBURKLÆDNINGUR**
uml. 260 fermetrar (19 x 148) óimpregneraður, bíliga til sølu.
*Tlf. 314740*

**PANASONIC FARTELEFON**
Panasonic fartelefon við fototóli. Ein 4 mðr. gomul grá Panasonic fartelefon við innbygdum digitalum fototóliog litdisplay til sølu. Fyrrprísur kr. 6.000,-. Til sølu fyri kr. 3.500,-
*Tlf. 225811*
*ella 317847*

**OYRASNIGIL TIL NOKIA 3330**
Er tað nakar sum kann geva ella selja mær ein oyrasnigil. Skal vera væl viðfarin og rigga til Nokia 3330.
*Tlf. 267515*

**FÆRØSK STRIK EFTERLYSES**
Da jeg har set en købt færøsk trøje, sum var meget flot, er jeg blevet meget interresseret i opskrifter på sådanne trøjer. Alt har interesse, også kopier. Venlig hilsen
*Else Nielsen,*
*Steen Billesgade 8,*
*9000 Ålborg*

**TRØÐ Í VATNSOYRUM TIL SØLU**
Um hóskandi boð fæst er óbygd trøð, matr. nr. 405 A í Vatnsoyrum, til sølu
*Tlf. 506118*

**FLUGUTRÁÐA**
Ein sera flott flugutráða 25 ára gomul, næstan óbrúkt, til sølu fyri 2.000 kr. Ein samling av pengum, lyklaringum, upptrekkjarum tendrarum og 85 tlf. kort til sølu.
*Tlf. 270427*

**TIL SØLU**
Ein úthurð við síðupartíi. Hon er útvendugt mát 117 cm breið og 209 cm høg. (Mahogny)
*Tlf. 218811*

**TIL SØLU**
Ein SCSI kontrollari til sølu fyri 700 kr. Nýprýsur 1400 kr.
*Tlf. 254153*

**TIL SØLU**
RAM kort til m.a. digitalkamera. 128 MB SmartMedia Card bíliga til sølu vegna feilkeyp 400 kr.
*Tlf. 219280*

**MYNDATÓL TIL SØLU**
1 1/2 ára gamal Minolta Dynax 505si kassi til sølu fyri 1800 kr. 1 ára gamalt Minolta 3500 xi blitz til sølu fyri 1500 kr. 1 ára gomul Tamron 28-300 mm. aspherisk linsa. til sølu fyri 5000 kr. Samlað til sølu fyri einans 7500 kr., nýprísur 13000 kr.
*Tlf. 260590*

**FLOGFERÐ**
fyri 2 til London til sølu fyri 2500 kr. Úr Føroyum 31. juli og heimaftur 11. aug.
*Áhugað ringið 211474*
*ella 321474*

**DVD FILMAR TIL SØLU**
The 6th Day 150,- Frantic 100,- Along Came á Spider 150,- Godzilla 150,-
*Tlf. 262271*

**TIL SØLU**
1 par svartaskógvar nr. 41 og 1 par arbeiðssikkurheitsskógvar nr. 43 (nýggir) til sølu.
*Tlf. 270427*
*ella 312981*

**GRUNDSTYKKI Í SØRVÁGI TIL SØLU**
Fæst hóskandi boð, er eitt stórt grundstykki »Uppi í Trøðum« í Sørvági til sølu. Stykkið er 869 fermetrar stórt og útsýnið er sera gott.
*Tlf. 332105*

**TIL SØLU**
14 dagar gomul fartelefon Nokia 3650 við innbygdum kamera og fototóli til søluf yri kr. 3.200,- Nýprísur kr. 4.000,-
*Tlf. 441384*

4. brunnurin á landgrunninum:

# Boriskipið nærkast – leggja seinastu hond á fyrireikingarnar

**OLJULEITING**
*Jan Müller*

Tað verður italska oljufelagið ENI (Agip) sum skal royna seg á landgrunninum í ár. Eftir at hava gjørt alt tað neyðuga fyrireikingararbeiðið nú í fleiri ár fer italska felagið saman við oljufelagnum Føroya Kolvetnni at seta borin í á landgrunninum umleið 15. juni. Boriskipið Belford Dolphin er á veg til Føroya. Tað seinasta vit vistu var at tað lá í Ullapool og gjørdi klárt at leggja kósina móti Føroyum. Umboð fyri Oljumálastýrið hava verið í Las Palmas og hugt at skipinum fyri at tryggja sær, at alt er sum tað skal vera. Seinasta eftirlitið frá føroyskari siðu er í Ullapool í hesum døgnum.

Tað var annars við sera stórum áhuga at umleið 80 til 100 limir í Oljutinginum í farnu viku lurtaðu eftir leitistjóranum hjá ENI;, Luca Dragonetti. Hann greiddi frá fyrireikinginum og sjálvari boringini og vísti áhugaverdar glarur á veggin á Hotel Hafnia.

Luca Dragonetti greiddi frá, at gongur alt sum ætlað verður borurin settur í umleið 15. juni. Teir ætla so at bora í einar 45 til 55 dagar. Brunnurin liggur miðskeiðis millum brunnin sum BP boraði og tann sum Amerda Hess boraði. Ætlanin er at bora niður á 4250 metrar tvs. umleið tað sama sum



*Luca Dragonetti frá ENI greiddi frá um komandi boringina*
*Mynd Jan Müller*

Amerada Hess boraði í Marjun-prospektinum. Hetta hevur felagið bundið seg til yvirfyri oljumyndugleikunum.

Hósdagin koma umleið 7 fólk frá ENI úr Milano og Onglandi til Føroya at taka sær av boringini. Allar fyrireikingarnar eru gjørdar á høvuðsskrivsstovuni í Milano. Luca Dragonetti segði, at teir ætla ikki at testa brunnin, sjálvt um teir treffa við olju. Hetta eru teir ikki vanir við at gera serliga ikki í frontierøkjum sum tí føroyska. Brunnurin er so tann einasti hjá felagnum her um leiðir í ár (herí íroknað alt tað bretska økið eisini). Finna teir olju so er tíð til at testa í sambandi við apprailsalbrunn. Verður olja funnin í rakstrarverdugum nøgdum so kann ein framleiðsla byrja í 2007 ella 2008.

Luca Dragonetta metti so eisini um møguleikarnar at finna olju. Størsti trupulleikin og óvissan liggur í spurninginum um tak, sum kann halda oljuni. Hetta er so eisini tað, sum var trupulleikin í hinum brunnunum.

ENI hevur eisini eitt 9 ára loyvi, sum liggur inni á basaltøkinum. Uppá fyrispurning hvat hann heldur um basalttruipulleikan segði Luca Dragonetti, at enn hevur tað ikki eydnast at loysa basaltknútin. Her er nógv arbeiði eftir at gera. Enn eru ikki gjørd nøkur verulig gjøgnumbrot í basaltspurninginum. Eni skal eins og hini oljufeløgini sum hava 9 ára loyvi geva oljufyrisitingini eina frágreiðing um, hvat felagið ætlar við hesum loyvinum.

Luca Dragonetti varð eisini spurdur hvussu stætt er við føroysku luttøkuni í sambandi við boringina. Til tað svaraði hann, at teir fóru eins og hini feløgini at brúka útgerðarhavnina í Runavík. Hann vísit eisini til, at tá talan bara er um ein kannignarbrunn, sum er í gongd í sera avmarkaða tíð, tá er tað eisini avmarkað, hvussu nógvum vørum og tænastum sum brúk er fyri. Tað er so eisini ein spurningur, hvar man kann finna ekspertisu í Føroyum á teimum ymsum økjunum í sambandi við ein leitibrunn.



*Nógv fólk høvdu leitað sær oman á Hafnia at hoyra um 4. Brunnin*
*Mynd Jan Müller*



## HEILSANIR



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við degnum 7. juni.
**Ynskja Jón og Birni**



**Góði Jóhannes**
Hjartaliga tillukku við 7 ára føðingardegnum. Jesus pápi verði hjá tær.
**Bestu heilsanir frá Annfinn og mammu**



**Allar fittasta Bára!**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum tann 10. juni. Gitta hvussu góðar vit eru við teg? …sooo góðar!
**Mostrarnar Annie og Lillie**



**Góði Jóhannes!**
Hjartaliga tillukku við degnum tann 8.6. Her ert tú fittur og hjálpir ommu at binda. Jesus signi teg.
**Ynskja omma og abbi á Skála**



**Góða mostir**
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum. Takk fyri at tú ert so góð við okkum.
**Blíðar heilsanir Elsuba Malena og Pætur**



**Góði Ari**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardenu. Jesus pápi signi teg.
**Heilsan mamma, mabba og Lea**



**Góða Bára**
Hjartaliga tillukku við trý ára degnum tann 10. juni. Takk fyri, at tú ert so røsk at hjálpa ommu.
**Heilsan omma og abbi**



**Góði babba**
Eg og mamma ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum í dag og góða eydnu í morgin. Vit elska teg.
**Róar**




**Góði elskaði Gulak!**
Hjartaliga tillukku við tínum fyrsta føðingardegi 9. juni.
Jesus pápi signi framtíð tína.
**Heilsan omma, abbi, babbaba og fastir**


**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ....................................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«